# Fundarfrásøgn

Skúlastýrisfundur nr 6-2009/10, tann 25. januar 2010, í Norðskála/Oyrar skúla frá kl 17.00 til kl 19.00.

Fundarluttakarar:

Foreldraumboð: Dávid Reinert Hansen, Nomi á Stongum, Gunnleyg Wang Jacobsen
Kommunustýrisumboð: Avboð var givið vegna kommunustýrisfund.
Læraraumboð: Mirjam Zachariasen
Skúlaleiðarin: Sonni Djurhuus

Fundar skrá:

1. Opin mál:
   - Uppskot um broytingar í fólkaskúlalógini
   - Sparingar
   -
   -
2. Samstarv við barnagarðin
3. Komandi skúlaár
4.
5.
6.
7. -
8. -
9. -
10. Ymiskt

1. **Opin mál:**
   - Uppskot um broytingar í fólkaskúlalógini
   - Sparingar
   -
   -

   Hesin skúlin skal spara 2 % av tímajáttanini frá 1. mars. Hetta merkir uml. 4 tímar um vikuna. Vit taka hesir tímar av vikarjáttanini. Skulu rokna við, at hetta eisini verður galdandi frá 1. august.
   Broytingar í fólkaskúlalógini:
   Fólkaræðisliga er hetta at fara ov langt, at taka fólkaatkvøðuna av, hetta er eitt álop á fólkaræðið. Tað er eitt stórt stig at taka, at taka fólkaatkvøðuna av. Frá tí at spyrja fólkið og til tað, at nú skal eingin spyrjast eftir er í so stórt stig at taka. Prinsipielt kann ein siga, at Landsstýrismaðurin kann avgera, at ein komandi skúli í Sunda kommunu skal t.d vera á Eiði ella øvugt hann skal vera her á Oyrarbakka. Hetta er at fara ov langt. Hetta gevur landsstýriskvinnuni eina ótálmaða heimild til at sentralisera fólkaskúlan.
2. **Samstarv** við barnagarðin
   Vit hava í longri tíð havt samskifti við barnagarðin um, at etablera eitt formelt samstarv. Her hugsa vit um upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri skúlan, og umvent hvørjir upplýsingar eru viðkomandi fyri barnagarðin. Vit fara, at samstarva um børnini, sum koma í skúla og aldursbólkurin 1 - 3 flokk. Vit hava innskrivingina hóskvøldið 28.01.10 kl.17.00, har vit

samstundis hava fund við foreldrini um, at fáa loyvi til at fremja hetta samstarv. Vit ynskja, at fáa hetta skrivliga frá foreldrunum. Leiðslan í barnagarðinum er við uppá, at vit fremja hetta og tey eru glað fyri, at vit sum skúli vísa henda áhugan.

3. **Komandi** skúlaár
   Vit koma at fáa stórar útfordringar komandi ár. Teir fysisku karmarnir koma, at seta stór krøv. Vit koma at vera 77 næmingar. 3 lærarar koma væntandi av gevast.
4. 
   Óla Jákup hevur avgjørt, at siga starvið frá sær. Starvið verður væntandi lýst leyst til várs.
5. 

6. 

7. -

8. -

9. -

10. **Ymiskt**
    Tað verður einki gjørt meira við tryggum skúlavegi frá kommununar síðu. Tað eru boðini frá kommununi. Vit hava fingið, at vita kunnu kæra.